# Niður aftur á jørðina

**Eftir eina góða viku í altjóða fótbólti, skulu tólv føroyskir landsliðsspælarar í hesum vikuskiftinum seta seg upp til bólkaumfarið í steypakappingini**



*Øssur og B68 skulu hitta B71*

Í fyrrakvøldið komu tveir triðingar av landsliðsspælarunum aftur til Føroya. Eftir longu ferðina til Luksemburg og Russlands høvdu teir nógv hugaligt í viðførinum trý stig, málmunin 2-1, og fína umrøðu frá fjølmiðlum kring alt Europa og eisini úr øðrum pørtum av heimin-um.

Felags fyri umrøðurnar er staðfestingin av, at Føroyar ikki longur eru ein pinkutjóð, sum flestu lond smyrja av. Nú eru ávaringarljósini farin at blinka nógva staðni, og sveisarar, russarar og jugoslavar fara saman við teimum í Luksemburg at fyrireika seg nágreiniliga, áðrenn teir seinni í ár koma henda vegin.

### Løgmanssteypið

Í hesum vikuskiftinum er annað umfarið í kappingini um løgmanssteypið á skránni, og tað skulu tólv av teimum, sum hava verið við á landsliðsferðini, seta seg upp til.

Í bólki eru dystirnir í dag B68-B71 og ÍF-KÍ. Á Toftum verður Suni Johansen dómari, og har vera tríggir landsliðsspælarar á vøllinum: Fróði Benjaminsen, Hans Fróði Hansen og Øssur Hansen. Í Fuglafirði verður Regin Egholm dómari. Tomislaav Sivic og Pauli Jarnskor hava hava allar sínar spælarar til venjing hesar báðar síðstu vikurnar, tí hvørki ÍF ella KÍ eiga fólk á landsliðnum.

Í bólki tvey eru tveir dystir á skránni í morgin. Í Gundadali skal Lassin Isaksen halda skil á, tá grannarnir í høvuðsstaðnum bresta saman. À vøllinum vera seks landsliðsspælarar – tríggir á hvørjum liðnum. Men meðan John Petersen og Jákup á Borg hava spælt tveir landsdystir á tamb, og Pól Thorsteinsson slapp upp í aftur í Moskva, so hava HB spælararnir fyri tað mesta verið á landsliðsbeinkinum. Andrew av Fløtum og Jóhannis Joensen vóru á beinkinum alla tíðina í báðum landsdystunum, og Rógvi Jacobsen var inni eina løtu í Luksemburg.

Á Tvøroyri verður Eiler Rasmussen dómari. TB eigur ongan landsliðsspælara, og GÍ eigur ein. Tað er Sámal Joensen, sum nú man vera komin fyri seg eftir krímið, ið helt honum uttanfyri í Luksemburg, og sum hevði við sær, at landsliðsvenjarin ikki tordi at geva honum møguleikan frá fyrsta bríksli í Moskva.

Í bólki trý hittast VB og NSÍ í morgin. Birgir Sondum verður dómari, og meistararnir í Vági, sum eru funnir ov lættir til umboð á landsliðnum, fáa høvi at síggja veteranin Jens Martin Knudsen og nýggja stjørnuskotið og málskjúttan í Luksemburg, Christian Høgna Jacobsen.

Hin dysturin verður í Miðvági í dag. FSV fær vitjan av EB/Streymi. Tað verður áhugavert, m. a. tí nógv rokna hesi bæði liðini sum mest uppløgdu evnini at stríðast fyri at sleppa undan beinleiðis niðurflyting í landskappingini. Tummas Pauli Olsen verður dómari, og eingin landsliðsmaður verður á vøllinum.

**jh**

# Stjørnuspæl og silvur

**Fyri fyrstu ferð í langa tíð líktist Stjørnan einum meistaraliði, tá tær vunnu stórt á Neistanum, sum ætlaði sær heiðursmerki**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Hóskvøldið vístu fráfarandi meistararnir í kvinnuhondbólti fyri fyrstu ferð í langa tíð meistaraspæl, tá Neistin fekk av at vita í Klaksvík.

Neistakvinnurnar vóru seinar til Klaksvíkar, og tí var dysturin eisini seinkaður. Men hóast tær høvdu stutt skoðbrá at gera klárt til dystin, var tað bara fyrstu løtuna, at Neistin kláraði at fylgja við væl upplagda heimaliðnum.

Stjørnan fór eftir lítlari løtu frá Neistanum, og restina av dystinum vaks munurin millum liðini upp í 20 mál.

Neistin var púra fyri ongum stórar partar av dystinum. Verjuspælið var vánaligt, og í álopinum var talan um veruligt maktarloysi.

### Órógv órógvaði

Stjørnan var saman við VÍF favorittur til meistaraskapin í ár, men um ársskiftið kom Stjørnan inn í eina vánaliga gongd, sum liðið ikki mundi sloppið burtur úr aftur.

Órógv á liðnum var viðvirkandi til framhaldandi vánalig avrik á vøllinum, lagið var vánaligt, og gullið hvarv í gulu og bláu havsbrúnni.

Tað var ein smeitur fyri liðið, at Vesna Tomajek valdi at fara heim til Jugoslavia, men avgerðin hjá henni var eisini viðvirkandi til, at støðan í felagnum stabiliseraði seg, og bæði spælarar, venjari og leiðsla kendu treytirnar fyri restina av árinum.

Síðani hevur Stjørnan fótað sær eftir nøkur trilvandi avrik afturat, og hóskvøldið var talan um veruligt meistaraspæl ímóti einum Neistaliði, sum seinastu umførini hevur togað seg upp móti heiðursmerkjaplássunum.

### Gott spæl

Stjørnan var væl uppløgd frá byrjan. Álopsspælið gekk skjótt og neyvt, og ferð eftir ferð spældi heimaliðið seg ígjøgnum Neistaverjuna.

Skjótálopini riggaðu eisini væl, og serliga fyrra partin av seinna hálvleiki skoraði Stjørnan ferð eftir ferð við skjótum álopum fram eftir vøllinum.

Simona Dziugyte er farin at trívast í Klaksvík, og tað sæst eisini aftur á vøllinum. Hon er gjøgnumbrotssterk, hevur eitt rúkandi hart skot, og hon stendur seg nú eisini væl í verjupartinum.

Týskvøldið skoraði Simona 10 mál, og hon var trygg sum brotsskastskjútti allan dystin.

Í seinna hálvleiki vaks munurin millum liðini upp í 20 mál, og fyrstu 20 minuttirnar av seinna hálvleiki skoraði Neistin bara tvey mál!

### Seinasta spruttið

Móti endanum av dystinum ressaðust gestirnir eitt sindur, og teir fingu fleiri mál seinasta partin av dystinum, tá Stjørnuliðið tók sær av løttum.

Neistin manglaði Katrina á Neystabø, og tað sást aftur í álopsspælinum, men tað var ikki einasti munurin millum liðini.

Stjørnan hevði funnið meistaraspælið framaftur, men kanska heldur seint, tí um eina viku tekur VÍF formliga við heitinum. Stjørnan kann tó gera eitt seinasta sprutt, tí VÍF skal á seinasta leikdegi spæla ímóti júst Stjørnuni í Vestmanna.

Neistin hevur framvegis møguleikan at vinna bronsu, men VB hevur fittan mun áðrenn seinastu dystirnar í kappingini.



*Stjørnuliðið var sera væl upplagt í dystinum ímóti Neistanum hóskvøldið, og nú hava klaksvíkskvinnur tryggja sær silvurið í kappingini*

# Kyndil eltir silvurmerkini

**Bæði í kvinnu- og mansdeildini í hondbólti eru gullmerkini farin til Vestmanna, men enn er harður dystur um silvurmerkini hjá monnunum. Har stendur tað millum StÍF og Kyndil, meðan tað hjá kvinnum verður Stjørnan, sum verður næstbest**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Sunnudagin spæla bæði kvinnuliðini og mansliðini hjá Kyndli og VÍF í høllini á Hálsi. Serliga spennandi verður dysturin millum mansliðini, hóast VÍF longu er føroyameistari.

Talan er um ein klassikara í føroyskum hondbólti, og tí fer VÍF ikki at lata Kyndil sigra uttan ein harðan dyst. Kyndil skal vinna fyri at halda lív í vónini um at vinna silvurmerkini í ár, og hóast tað ikki er gullið, teir dystast um longur, so fara teir at leggja nógv fyri fyri at vinna á arvafíggindanum.

Kyndil er í løtuni eitt stig aftanfyri StÍF, og bæði liðini hava spælt eins nógvar dystir. StÍF skal sunnudagin spæla ímóti Neistanum á heimavølli.

Í Vestmanna møtast KÍF og Tjaldur, har útiliðið skal royna at lyfta seg av aftasta plássinum.

### Alt avgjørt hjá kvinnum

Í fremstu kvinnudeildini er næstan alt avgjørt. VÍF er føroyameistari, meðan Stjørnan, sum vann FM í fjør, endar á øðrum plássi. Hetta gjørdist greitt, tá tær vunnu á Neistanum hóskvøldið.

Stjørnan spælir aftur í dag leygardagin móti Tjaldri, sum er tvey stig frammanfyri Sóljuna á aftasta plássi. Hetta er næstseinasti dysturin hjá Stjørnuni, og tær kunnu ikki fangast á øðrum plássi.

VB skal bara hava eitt stig afturat fyri at ogna sær bronsumerkini. VB spælir sunnudagin í Vági móti Neistanum.

Vikuskifti

Nr. 64 • leygardagur • 31. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Gríma:

Eksorsisma í Sirkus Psycho



síðurnar 18 og 19

**FERÐIN. Í Norðurlandahúsinum í kvøld ber til at fylgja Sunnleifi Rasmussen og teimum mongu á leið, sum farin eru undir eina festliga norðhavsferð í orðum og tónum. Ferðaseðil loysa tey í dýrmæta brævasambandinum millum Jørgen-Frantz Jacobsen og William Heinesen**

# Síðsta kvøldið í mars



*Tónleikaverkið »Ferðin« tekur støði í dýrmæta og lívgandi brævasambandinum millum systkinabørnini Jørgen-Frantz Jacobsen og William Heinesen. Upprunaligu brøvini liggja á savni í Danmark, men kanska gera tey brátt eina festliga norðhavsferð* Mynd Jens Kr. Vang

ORÐ OG TÓNAR
*Birgir Kruse*

– Okkurt kvøldið, so fer himmalin at standa lýsandi grønur. Tað er várssins unga, sterka ljós, sum verður føtt. Soleiðis sigur Jørgen-Frantz Jacobsen í einum bræv til systkinabarnið William Heinesen á nýggjárinum í 1921.

Brævið, ið er sett saman sum eitt leikandi tónleikastykki, ein nýggjársouvertura, endar í hesum parti, rondo allegro, við at brúka tíðarfestingina »okkurt kvøldið í mars«. Og nú er stundin her, nú er hin lagaliga stundin, nú er hitt síðsta kvøldið í mars.

Tískil eru allar treytir loknar fyri eini hepnari uppliving, nú »Ferðin« kann gerast á palli í Norðurlandahúsinum. Ein ferð, sum tekur støði í brøvum Jørgen-Frantzar. Lívsjáttandi brøv, beint sum boðini um ólekjandi sjúku eru borðin.

Hundrað ára hald Jørgen-Frantz Jacobsens var hin 29. november í fjør. Nógv varð gjørt burturúr, skjøl komu fyri dagin, bøkur komu út og miðlarnir skrivaðu. Og tað er einki løgi í tí. Tað stutta æviskeið, Jørgen-Franzti varð tillutað, megnaði hann sum fáur at opna ein heim, inneftir og úteftir. Ein sannur kosmopolittur. Við penninum sum amboði.

Í Útvarpinum hoyrdu vit um sama mundið Sverra Egholm sála, lesa úr dýrmæta og lívgandi brævaskiftinum, sum var millum systkinabørnini. Einar 1500 tætt skrivaðar kvartsíður, sigur William. Ella ein millión av orðum, skulu vit telja sandkorn á Guðs gólvi.

Upplesturin hjá Sverra og Jógvani Arge bygdi á útgávuna hjá Bókagarði frá 1976, sum Chr. Matras týddi. Eins og í donsku Gyldendal-útgávuni frá 1958, er tað William Heinesen, sum tekur saman um og staðfestir, at »í hesum brævasavni, sum røkkur um árini frá 1918 til deyða Jørgen-Frantzar í 1938, stendur hetta skeiðið av lívi hansara speglað so skilligt og sterkt, at neyvan man makin vera at finna í nakrari sjálvsævisøgu«.

Besti vinur Jørgen-Frantzar var pennurin og hin svárasti fíggindin sjúkan. Tuberklarnir.

Í hesum dysti millum lív og deyð, ljós og myrkur, heimligt og fremmant, er tað, at Jørgen-Frantz í 1923 skrivar, at »tað er ein narkosa hjá mær, ein dagliga afturvendandi frøi, at lata mín gróðurmikla fyllipenn fara renn-andi eftir ørkunum«. Í hesum sama brævi heldur hann fram við at hálovað penninum, hesum svarta fína luti, sum »við sínum gullhøvdi altíð er so ríkiliga fljótandi, blekkgevandi. Ein ótornandi lind, ein ímynd av virkisfýsni og gróðursemi. Og so lagaligt hetta amboð er! Hann kennir skrift mína eins væl og hesturin mannin á baki sínum«.

Tað var bara í teim heilt ringastu løtum, tá pennurin ikki vildi stýrast á ferðini eftir breiðu ørkunum, at Jørgen-Frantz tók til fyrimannin, sum William Heinesen sigur í innganginum til júst tann partin í bókini, sum tónleikaverkið »Ferðin« í kvøld tekur støði í. Hesi veiku blýantsstrok kundu vit eisini síggja í handritinum til »Barbaru« í Norðurlandahúsinum hundrað ára dag skaldsins.

William Heinesen sigur um brøvini, at í mongum teirra »sveimar hugur hansara tokkabundin um Føroyar og føroyska náttúru, eitt yndi, sum varð kyknað sterkt uppaftur í honum av vitjan hansara heima. Tann háfloygdi tónin í hesum ungdómsbrøvunum fær mál í lovsongum sum hesum, ið her verður uppafturtikin« sigur William. Og so kemur hann. Teksturin, sum verður sendur í ringrás í kvøld, hetta síðsta kvøldið í mars.

– Vit ynskja góða ferð og gott vikuskifti!



*Sunnleif Rasmussen hevur skapt tónleikin við støði í orðum Jørgen-Franzar, sum Urd Johannesen hevur sett ferð á*